## VEÐRIÐ




**Í dag,**
**Skýggjað av og á við regnæli, vátakava og kava. Nógvur vindur, upp í skrið av vestri, 15 til 20 m/s. Hitin millum 2 og 5 stig.**




**Hósdagin**
**Skýggjað og regnæl av og á, vátakavi og kavi. Nógvur vindur, upp til skrið av vestri, 15 til 20 m/s. Hitin millum 1 og 3 stig**

**Fríggjadagin**
**Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi, 5 til 10 m/s, sum fer í ein útsynning og aftur og eina løtu upp í hvassan vind, 10 til 15 m/s. Skýggjað og tíðliga á degnum vátakavi ella regn, seinni regnæl. Hitin millum 2 og 5 stig.**

# Føroyskt øl í Vejle

## Í Vejle halda tey nógv um føroyskt øl

RÚSDREKKA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*




*Erling Juhl hevur føroyska, og hann elskar føroysk jólabryggj. So nógv at hann selir føroyska ølið í Vejle*

**Vejle:** Vøruúrvalið í Havnens Vin & Tobakshus í Vejle hevur eitt rættiliga stórt úrval av vørum. Uttan at gera ov nógva reklamu, mugu vit viðganga, at hesin handilin hevur eitt ikki sørt lítið spennandi úrval av bæði øli, víni og tubakki.

Hyggja vit nærri at úrvalinum av øli, so er øl úr øllum pørtum av Danmark og úr flest øllum heimsins hornum. Tú varnast eisini, at alt ríkið er umboðað. Fyri trettan krónur, kanst tú fara útaftur við einari Føroya Bjór Black Sheap.

### Føroyskt er spennandi

Tað er leiðarin fyri øl partin av handlinum Erling Juhl, sum hevur borið so í bandi, at føroyskt øl kann fáast til keyps í Vejle. Og tað skal sigast, at tað ikki bert er Blacksheap, sum er til sølu. Men tað er bert Føroyar Bjór.

Kona Erling Juhl, Petra, er føroysk og ættað úr Vági. Umvegis konuna, er Erling vorðin fjeppari av føroysku øli, og tey seinastu trý árini hevur hann eisini selt til danir og føroyingar á leiðini burturav sendingini úr Klaksvík.

– Eg haldi, at føroyskt øl er sera spennandi. Tað er heilt klárt ein kvalitetsøl, sum øldrekkarar seta prís uppá, sigur Ering Juhl.

Kundunum dámar best Black Sheap, men tað er jólabryggið, ið er ovast á listanum hjá Erlin sjálvum. Eisini hevur hann eitt gott eyga á porteranum.

Í Føroyum eru tað bert greinir sum hendan, ið kunnu kunnað um føroyskt, men í Danmark kanst tú lýsa sum tær lystir, og Erling nýtir eisini eitt sindur av peningi at lýsa við tí føroyska ølinum.



*Snøggi handilin í við havnalagi í Vejle, har tú eisini kanst keypa føroyskt øl*

## V4-dráttur

**í drátti nr. 1569**
**31.des. 2004**

**Tølini:** 2-5-6-12-17-21-22-23-24-29-32-33-47-53-66-69

**Vinnararnir eru:**

Snars. nr. 2661826 (Farseðil)
Snars. nr. 2663169 (Farseðil)
Snars. nr. 2891546 (Hvalba)
Snars. nr. 2922618 (Hjá Gunnleivi, Tórshavn)
Snars. nr. 2982026 (Shellstøðin í Miðvági)
Vanl. s. nr. 286589 (Seldur í Vestmanna)

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -11 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 9 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -3 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 7 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 12 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 10 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 33 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Í gjár
Eitt lágtrýst, 960 hPa yvir Íslandi stendur í stað. Eitt nýtt lágtrýst dýpist frá havinum sunnan fyri Grønland til havið í ein útsynning úr Føroyum.



Í dag
Upp í skrið av útsynningi við hørðum hvirlum. Mest skýggjað og regnæl. Hitin um 5 stig

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/1 kl. 06⁰⁰–4/1. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 41,0 mm – mált frá 3/1 kl. 06⁰⁰–4/1 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 45,2 mm

RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

10. januar — Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. Jan | 01.36 | 14.04 | 00.36 | 13.04 | 00.51 | 13.19 | 03.36 | 16.04 | 04.36 | 17.04 | - | 12.19 | 11.19 | 23.39 | 01.51 | 14.19 | 02.51 | 15.19 | 01.21 | 13.49 | 02.36 | 15.04 |
| 6. jan | 02.24 | 14.49 | 01.24 | 13.49 | 01.39 | 14.04 | 04.24 | 16.49 | 05.24 | 17.49 | 00.39 | 13.04 | - | 12.04 | 02.39 | 15.04 | 03.39 | 16.04 | 02.09 | 14.34 | 03.24 | 15.49 |
| 7. Jan | 03.11 | 15.40 | 02.11 | 14.40 | 02.26 | 14.55 | 05.11 | 17.40 | 06.11 | 18.40 | 01.26 | 13.55 | 00.26 | 12.55 | 03.26 | 15.55 | 04.26 | 16.55 | 02.56 | 15.25 | 04.11 | 16.40 |
| 8. Jan | 04.05 | 16.37 | 03.05 | 15.37 | 03.20 | 15.52 | 06.05 | 18.37 | 07.05 | 19.37 | 02.20 | 14.52 | 01.20 | 13.52 | 04.20 | 16.52 | 05.20 | 17.52 | 03.50 | 16.22 | 05.05 | 17.37 |
| 9. Jan | 05.05 | 17.38 | 04.05 | 16.38 | 04.20 | 16.53 | 07.05 | 19.38 | 08.05 | 20.38 | 03.20 | 15.53 | 02.20 | 14.53 | 05.20 | 17.53 | 06.20 | 18.53 | 04.50 | 17.23 | 06.05 | 18.38 |

5 707265 100036 >